## DAGSINS MEINING

# Vælferðin skal fíggjast

Landsfundur Javnaðarfloksins var áhugaverdur á mangan hátt. Eitt var tann idelogiska uppgerðin millum flokk og fakfeløg, sum ofta sæst,tá flokkurin er í samgongu. Í so máta var fundurin einki undantak og viðgjørdu vit hetta evni í oddagrein í gjár. Men floksformaðurin hevði annað og meira á lofti enn viðurskiftini við verkamannarørsluna. Hann viðgjørdi tey flestu stóru málini, sum eru uppi í tíðini. Eitt av hesum evnum var spurningurin um at varðveita og menna vælferðarsamfelagið.

"Vælferð krevur vøkstur í búskapinum. Hava vit ikki vøkstur í okkara búskapi, so hava vit heldur ikki orku til at halda fast um tað vunna og enn minni orku til framhaldandi batar og framstig. Tí er búskaparvøkstur ikki eitt liberalistisk gandaorð, ella nakað tey borgarligu hava patent uppá, men tað er so avgjørt ein sosialdemokratisk fortreyt. Hygg at okkara grannalondum, sum liggja fremst í heiminum, hvat vælferð viðvíkur. Tað, sum eyðkennir hesi lond, er fyrst av øllum ein semja um, at samfelagið skal skipast við møguleikum og trivnaði fyri øll, men veruliga grundin til, at henda útbygging hevur gingið so væl, er at hesi lond hava dugað at skapt ein støðugan búskaparvøkstur". Soleiðis málbar formaður Javnaðarfloksins seg í síni frágreiðing. Hetta orðaval kann bert tulkast sum, at flokkurin framvegis stendur fyri norðurlendska vælferðarmodellinum, hóast flokkurin hevur góðtikið eitt nú einskiljingarnar, sum standa fyri stavn.

Javnaðarflokkurin er sostatt komin til sama vegamót, sum brøðraflokkarnir í Norðurlondum. Hvat merkir hetta? Jú tað merkir, at útlitini fyri at kunna broyta kapitalistiska búskapin eru døpur. Men vælferðarsamfelagið skal jú fíggjast og má, sum er, fíggjast við tí búskaparligu samfelagskipan, sum ræður nevniliga tí kapitalistisku. Her er eingin bøn og tí má ásannast, at formaður Javnaðarfloksins gjørdi beint í at minna limir og fakfeløg á, at kostirnir í løtuni eru tvinnir: at lata standa til ella at síggja til, at karmarnir um verandi búskap eru so góðir, at hesin búskapur kann fíggja vælferðarsamfelagið.

Niðurstøða formansins var, at skulu vit halda fast um vælferðamálið, so mugu vit hava ein støðugan búskaparvøkstur, og hesin er treytaður av einum virknum og offensivum vinnulívi. Hetta er so satt,sum tað er sagt. Alt annað vildi verið ábyrgdarleyst, sum umstøðurnar eru í samfelagnum. Men harfyri eiga hugsjónirnar og deymarnir ikki at verða sleptir og harfyri eigur ikki at verða gloymt, at tað er neyðugt at hava neyvt eftirlit við einum búskapi sum okkara og samstundis at reka ein inntøkujavnandi politikk og at halda solidarisku kósina stútta.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein skattalætti »in Disguise«

**Vit kunnu ikki taka landskassan isoleraðan og tosa um ein lætta tá samlaða úrslitið gevur ein meirkostnað fyri kommunur og borgarar.**



**Gunvá við Keldu**
*Býráðslimur og formaður í Mentanarnevndini í Klaksvíkar Býráð*

Taðeratfegnastumatskattalættin í sam-gonguskjalinum, sum Fólkaflokkurin hevur lagt dent á í fleiri ár, nú umsíður sær út til at gerast veruleiki.

Eisini er gott at hoyra frá fundinum millum fíggjarmálaráðharran og kommunufeløgini bæði, at landsstýrið í sambandi við útreiðslurnar vil virka fyri at kommurnar fáa stundir at laga fíggjarætlanirnar til broytingarnar.

Tó má sigast at hesin skattalætti á mangan hátt er ein „maskeraður" skattalætti.

Tað sum landsstýri ger í hesum føri, er at flyta nakrar útreiðslur frá landi til kommunur og harvið kunnu teir seta landsskattin niður.

Í nógvum kommunum er skattaprosentið í hægra lagi. Við hesum politikkinum hjá landsstýrinum verður trýst lagt á kommunurnar at seta skattin upp. Í hesum føri velur landsstýrið at isolera seg og tosa um ein skattalætta, har tað í veruleikanum er skattaborgarin sum fíggjar. Haldi ikki at hetta er serliga positivt fyri álitisviðurskifti, millum land og kommunur.

Fyri Klaksvíkar Kommunu kemur hesin „skattalætti" veruliga at kosta. Vit hava frammanundan eina fíggjarætlan sum er hart kroyst. Vit síggja ferð eftir ferð at landsstýrið ger lóg-ir, har øki skulu flytast frá landi til kommunur og harvið skulu fíggjast yvir kommunuskattin. Eitt er tá pengar fylgja við økjum sum vera løgd út, sum ikki er meir en natúrligt, men tá landsstýrismaðurin fer út og kallar hetta ein skattalætta er tað ikki heilt rætt.

### Borgarin skal gjalda meir

Fyri komandi fíggjarár vil Klaksvíkar Kommuna fáa hesar inntøkur og meirútreiðslur við broytingunum hjá landsstýrinum:

**Inntøkur**
Broyting í FAS skattinum, her vinnur kommunan kr. 500.000

Útreiðslur
Yvirtøku av barnaverndarøkinum kr. 3.700.000

Nýtsla av dagstovnaskipanini, leysliga mett kr. 50.000

Broyting í stuðlinum til bókasøvn kr. 400.000

Dagtilhaldskipanin løgd út á kommunurnar kr. 670.000

Arbeiðsgevarin skal gjalda størri part av barsils- og arbeiðs-marknaðar-eftir-lønar-gjaldinum kr. 200.000

Samlað útreiðslur íalt kr. 4.520,000

Við hækkaða botnfrádráttinum, setur kommunan kr. 1.500.000 til. Men her er at fegnast um at borgarin veruliga fær ein skattalætta, sum Fólkaflokkurin eisini hevur arbeitt fyri. Fleiri onnur øki eru í umbúnað at verða løgd út á kommunurnar, sum eg ikki havi nevnt.

Landið hevur so nógv sløg av inntøkum sum verða tiknar frá fólkið, tólum og feløgum, so sum skatt, mvg, toll og onnur avgjøld. Harafturímóti hava kommunurnar einans skattin at dúva uppá. Nevnast má eisini at landsskatturin er progressivur ímeðan kommunuskatturin er proportionalur.

Sum er hevur Klaksvíkar Kommuna eitt skattaprosent á 20,75 og er hetta í hægra lagi.

Eg haldi ikki at gongda leiðin hjá okkara kommunu er at seta skattaprosenti upp, men útreiðslurnar ið nú verða lagdar út á kommunurnar skulu fíggjast og verður tað so í skerdum rakstri, sum aftur rakar borgararnar í komununi. Tvs. at um skattaborgarin ikki betalir við kassa 1 so verður tað við kassa 2.

Tað er tí eitt sindur misvísandi tá landsstýrið fer út og fortelur føroyingum at nú fáa vit skattalætta. Vit kunnu ikki taka landskassan isoleraðan og tosa um ein lætta tá samlaða úrslitið gevur ein meirkostnað fyri kommunur og borgarar.

# Til minnis um minningarhaldið, sum ongantíð var

**Hildibjørt Gulklett**

1. november er friðaður teirra sjólátnu til minnis.

Teir spurdu so tráliga í Útvarpi Føroya, hví teir sigldu undir krígnum? – ein ikki sera gløggur spurningur!

Tað vóru ringar tíðir og lítið og einki at forvinna. Teir sum sigldu, vistu fullvæl, at tað var eingin stuttleikaferð, teir fóru.

Fyri at markera 60 ára krígslok, kundi Sjónvarp Føroya til minnis havt samrøður við teir, sum sigldu – tað er hóast alt onkur, sum hórar undan enn. Teir hava eina ørgrynnu av vitan at oysa av, so tað uppvaksandi ættarliðið, sum nú er, kundi fingið ein hóma av at ímynda sær, hvussu trupult alt var. Men so eiðasørt, at Sjónvarp Føroya læt við seg koma – tað kennist sera hugstoytt!

At enda vil eg siga stóra tøkk til FF fyri teirra fjøltáttaða lesnað, tað fløvar!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.